# Lýsa eftir list

**Tað gav beinanvegin úrslit, tá ið Valdemar Lützens Byggibúð í útvarpinum sóknaðist eftir málningum eftir William Heinesen og Ingálv av Reyni. Heilt nógv fólk ringdu**



*Høgni Lützen vil hava fleiri málningar á skrivstovuna, har hann hevur bustu av stovnaranum Valdemar standandi. Bustuna gjørd Eivind Dalsgaard*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

LIST

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Fleiri fólk aftra seg við at lýsa málningar sínar til sølu, sjálvt um tey hava hug at selja.

Tær royndirnar hevur Høgni Lützen, stjóri í Valdemar Lützen Byggibúð.

Mánadagin og týsdagin hevði hann eina kunngerð í útvarpinum og sóknaðist eftir málningum eftir William Heinesen og Ingálv av Reyni til keyps.

- Heilt nógv fólk ringdu og søgdu seg hava málningar, ið tey fegin vildu selja. Tí var eg ikki sørt bilsin av, sigur Høgni Lützen.

Enn eru tað bara málningar eftir Ingálv av Reyni, hann hevur fingið bjóðað, og tað er ikki so løgið, tí fáir málningar eru eftir William Heinesen.

Høgni Lützen sigur, at fólk hava ringt úr øllum landinum, og í fleiri førum vóru tað eldri fólk, sum hildu seg tað sama kunna selja, tá ið nú onkur spurdi.

Valdemar Lützen Byggibúð fer ikki á nakran hátt at kunngera, hvørjum tey hava keypt málningar frá. Handilin fer fram í trúnaði.

## Tekur tíð

Áðrenn nakar málningur verður keyptur, vil Høgni Lützen hava fotomynd og upplýst støðd, og so verður farið at tingast um kostnaðin. Tað verður neyvan avgjørt fyri jól.

Tað er ikki nakar vanligur máti at fara í útvarpið at lýsa eftir list til keyps.

- Vónandi traðki eg ikki tey, sum hava gallarí, á tærnar, tá ið eg sigi, at vit valdu henda mátan fyri at sleppa undan at gjalda vinningin, sum gallaríini krevja, sigur Høgni Lützen.

Hann ætlar ikki at selja nakran málning víðari. Málningarnar eru ætlaðir at prýða skrivstovuna hjá byggibúðini við.

Eru tað onnur, sum hug at selja málningar eftir Ingálv av Reyni ella William Heinesen, kunnu tey ringja 213536 ella skriva til vld@vld.fo.

Kommunusamskipan Føroya

# AÐALSKRIVARI

**Aðalskrivarin hjá Kommunusamskipan Føroya, KSF, hevur tikið av øðrum avbjóðingum, og tí søkja vit eftir nýggjum aðalskrivara til felagsskapin.**

**KSF**
KSF er tvørkommunalur felagsskapur og virkar fyri felags áhugamálum og størri kommunalum sjálvræði. KSF umboðar vegna limakommunurnar umleið 70% av íbúgvunum í Føroyum.

Uppgávurnar hjá KSF eru m.a. at samskipa og fyrireika alt felagsarbeiðið og ráðgeva limakommununum í málum av felags áhuga. Dømi um slík mál kunnu vera: uppgávubýtið millum land og kommunur, umboðan mótvegis myndugleikum og feløgum innan- og uttanlands, lógarsmíð av áhuga fyri kommunurnar, uppskot til felags umsitingarligar mannagongdir og skipanir, førleikamenning o.a.

Vit samskifta og samstarva nógv við landsstýrið og landsumsitingina, vinnulívið og felagsskapir bæði í Føroyum og uttanlands. Av serligum áhugamálum í løtuni er komandi kommunala umskipanin, sum KSF og aðalskrivarin hava virknan lut í.

Á skrivstovuni í KSF-húsinum í Tórshavn eru umframt aðalskrivaran ein løgfrøðingur og eitt skrivstovufólk í starvi. Í KSF-húsinum hava harumframt Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Barnaverndarstova Føroya skrivstovur.

**KSF bjóðar**
Eitt starv við nógvum spennandi uppgávum. M.a. kann nevnast, at tú:

- Verður leiðari á skrivstovu felagsins
- Verður bindiliðið millum limakommunurnar
- Skal samskipa virksemið hjá limakommununum, herímillum at røkja politisk og faklig netverk
- Skal skipa fyri førleikamennandi tiltøkum fyri limakommunurnar
- Skal gera kunningartilfar og frágreiðingar til limakommunurnar
- Skal ráðgeva kommununum, bæði hvør sær og í KSF-hópi
- Verður protokollførari hjá KSF og skal ansa eftir, at samtyktirnar verða fylgdar
- Skal samskifta við landsumsiting, áhugabólkar og feløg innan- og uttanlands vegna limakommunurnar

**KSF roknar við, at tú m.a.:**

- Hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- Hevur umsitingarligar royndir
- Hevur áhuga í kommunalum viðurskiftum
- Hevur hugflog og evni at taka stig og seta í verk
- Dugir at at samskifta, bæði og skrift og talu
- Er málsøkjandi og hevur hegni til at samstarva við politisku skipanina

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært avtalu við grundarlagi í sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri at vita**
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til formann felagsins, Heðin Mortensen, tel. 302010, ella Jóan Petur Hentze, verandi aðalskrivara, tel. 282480.

**Umsókn**
Umsókn skal saman við upplýsingum um útbúgving og royndir vera KSF í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. januar 2010 kl. 12.00.
Send umsóknina til:

**Kommunusamskipan Føroya, KSF**
R.C. Effersøes gøta 30
FO 100 Tórshavn

Kommunusamskipan Føroya, KSF, er tvørkommunalur felagsskapur, ið virkar fyri felags áhugamálum og størri kommunalum sjálvræði. Aðalhugsjónin er, at kommunurnar skulu umsita øll mál, ið eru beinleiðis viðkomandi fyri borgaran.

KSF arbeiðir fyri greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur og fyri at styrkja kommunala myndugleikan. KSF veitir m.a. løgfrøðiliga ráðgeving, skipar fyri skeiðum og ger felags mannagongdir og upplýsandi tilfar til limakommunur og almenning.

Limakommunurnar í KSF eru Fuglafjarðar kommuna, Klaksvíkar kommuna, Runavíkar kommuna, Sands kommuna, Tórshavnar kommuna, Tvøroyrar kommuna og Vágs kommuna. Ovasta leiðsla felagsins er stýrið, ið er mannað við borgarstjórunum í limakommununum. Sí meira um KSF á ksf.fo.

SENDISTOVAN